# Burðardygdarfrágreiðing 2025

Føroya Banki

# Innihaldsyvirlit


3 Inngangur

7 Burðardygd

10 ESG

19 Áhugapartar

27 Átøk

33 Høvuðsniðurstøður

# Inngangur

**Góði lesari,**
Vit eru errin av aftur í ár at kunna leggja okkara Burðardygdarfrágreiðing fram – hesaferð fyri 2025.

Síðan 2018 hava vit fylgt Heimsmálunum hjá ST fyri burðardygd (SDG) sum útgangsstøði fyri okkara arbeiði við burðardygd. Vit samskipa arbeiðið og seta okkum mál við støði í Paríssáttmálanum og lokalum leið-reglum, og arbeiða áhaldandi við at flætta burðardygd í alt okkara virksemi.

**Fleiri mál rokkin**
Í 2025 rukku vit málinum um einki bein-leiðis útlát (vav 1), og vit halda fram við arbeiðinum um at minka um útlát frá el og hita (vav 2) fram móti 2030. Í samstarvi við aðrar fyritøkur, stovnar og mynduleikar arbeiða vit harafturat við at menna góðskuna í okkara vav 3-dátum, sum skal gera okkum før fyri at byggja eitt haldgott dátugrundarlag til at gera okkara arbeiði enn betri í framtíðini.

**Nýggj mál sett**
Í ár hava vit sett nýggj mál fyri okkara lyklatøl innan Environmental, Social and Governance (ESG) fram móti 2030. Síðani 2020 hava okkara miðvísu ESG-mál leitt okkum gjøgnum eina virðismikla læringartilgongd; nógv av okkara málum fyri 2025 eru rokkin, og onnur eru nær við at verða tað.
Við støði í royndunum seinastu árini hava vit tillagað okkara mál fyri 2030 fyri at styrkja okkara ESG-ávirkan enn meira.

**Javnvág millum arbeiðslív og privatlív**
Ein partur av arbeiðinum við burðardygd er at menna arbeiðsumstøðurnar fyri okkara starvsfólk. Okkara starvsfólk eru tað týdningamiklasta tilfeingið í samtak-inum, og tí leggja vit stóran dent á førleikamenning, javnstøðu millum kynini og javnvág millum arbeiðslív og privatlív hjá tí einstaka. Vit raðfesta trivnaðin hjá starvsfólkunum høgt, tí hann er ein fortreyt fyri menning og framgongd hjá samtakinum.

**Okkara leiklutur**
Vit ásanna tær avbjóðingar, sum stava frá veðurlagsbroytingum og altjóða óvissu, og okkara leiklutur sum fíggjarstovnur er at stuðla undir grøna orkuskiftið og samfelagsmenning. Okkara fremsta uppgáva er framhaldandi at skapa langtíðarvirði og at vera við til at styrkja samfeløgini, vit eru partur av, bæði í Føroyum og í Grønlandi.

**Góðan lesihug**

**Turið F. Arge**
Forstjóri



# Inngangur

## Meira enn ein fíggjarstovnur

Sum fíggjarstovnur veita vit tænastur til einstaklingar, fyritøkur og feløg í Føroyum og Grønlandi. Okkara virksemi fevnir um bankavirksemi, pensjónir, fastogn og tryggingar. Við meira enn 200 dugnaligum og royndum starvsfólkum bjóða vit eina samanhangandi heildarloysn.

**Grønland og Føroyar**
Í Grønlandi reka vit bankavirksemi undir navninum Bankivik, har vit síggja greiðar vakstrarmøguleikar í einum marknaði í menning. Í Føroyum veita vit bankatænastur sum Føroya Banki, tryggingar gjøgnum Trygd og fastognartænastur undir navninum Skyn.

Í tøttum samstarvi við okkara kundar arbeiða vit fyri at stuðla okkara kundum í at røkka fíggjarligum málum og samstundis eisini burðardyggum málum.

**Okkara leiklutur**
Vit hava ein greiðan leiklut í at stuðla umleggingini til eina burðardygga framtíð og hava flættað hetta inn í kjarnuna av okkara virkisstrategi. Opinleiki, ábyrgd og virðing fyri væntanum hjá áhugapørtum eru grundarlagið undir okkara arbeiði við burðardygd.

**Okkara royndir**
Við meira enn 100 ára royndum eru vit framvegis ein støðugur og álítandi samstarvsfelagi, ið røkir tøtt kundasambond, samstundis sum vit taka ábyrgd í tí lokala umhvørvinum og hava eina sterka kredittstýring.






## Úrslit 2025

Samtak

| | |
|---|---|
| Marknaðarvirði: | 2.746 mió. |
| Cost/income: | 52% |
| ROE: | 14,1% |

Føroya Banki:

| | |
|---|---|
| Inntøka: | 464 mió. |
| Vinningsbýti: | 202 mió. |

Trygd:

| | |
|---|---|
| Inntøka, tryggingar: | 165 mió. |
| Lønsemi (combined ratio): | 76% |

>2 mia kr. í íløgurøkt
í Grønlandi og Føroyum

**GRØNLAND**
BANK
(mDKK)

| | |
|---|---|
| Útlán | 980 |
| Innlán | 1.375 |
| Realkreditt | 1.111 |
| Marknaðarpartur | ~20% |
| Fulltíðarstavsfólk við ársenda | 17 |

**FØROYAR**
BANKI, TRYGGING OG
MEKLARI (mDKK)

| | |
|---|---|
| Útlán | 8.690 |
| Innlán | 9.581 |
| Realkreditt | 1.713 |
| Marknaðarpartur | ~40% |
| Fulltíðarstavsfólk við ársenda | 184 |

# Inngangur

## Okkara áhugapartar

Okkara arbeiði við burðardygd og samfelagsábyrgd er avgerandi fyri, at vit kunnu skapa langtíðarvirði fyri starvsfólk, kundar, samfeløgini, vit virka í, og íleggjarar. At byggja tætt sambond við hesar áhugapartar og skilja tey evni, sum hava størstan týdning fyri tey, er avgerandi fyri at tryggja okkara leiklut og ávirkan frameftir.

**DMA góðkend í 2025**
Fyri at skilja okkara ávirkan á umhvørvið og samfelagið, vit eru partur av, framdu vit í 2024 eina tvítýdningarmeting, Double Materiality Assessment, DMA, sum varð kannað av grannskoðara í 2025. Hendan metingin eyðmerkir, hvørji burðardygdarevni eru mest týðandi, bæði í mun til ávirkan á samtakið og ávirkanina, sum samtakið hevur á umhvørvið og samfelagið.

Í 2025 hava vit tikið støði í úrslitunum og hetta hevur givið okkum virðismikla vitan um okkara ávirkan á og raðfestingar av umhvørvi og samfelag.

DMA hevur harumframt varpað ljós á váðar og  møguleikar knýttar at ESG-viðurskiftum og hevur gjørt okkum før fyri at raðfesta greiðari og at styrkja sambandið millum burðardygd og fíggjarliga støðufestið.

**CSRD, Omnibus og hvat so?**
Hóast krøvini til okkum um at gera frágreiðing eftir Corporate Sustainability Reporting Directive (CSRD) eru slept orsakað av Omnibus-avgerðini hjá ES, fara lærdómarnir frá DMA framhaldandi at mynda okkara arbeiði við burðardygd og stuðla menningini av okkara komandi frágreiðingum. Hetta er eitt týðandi stig víðari í samstarvinum við áhugapartar og í arbeiðinum at fremja okkara burðardygdarátøk á ein skipaðan og innihaldsríkan hátt.



# Burðardygd

## Politikkur, nevnd og bólkur

Fyri at stuðla okkara strategiska arbeiði við burðardygd gjørdu vit í 2022 ein burðardygdarpolitikk, sum varð góðkendur av nevndini. Politikkurin gevur ein greiðan karm fyri, hvussu arbeiðið við burðardygd verður stýrt og skipað tvørtur um samtakið, og lýsir leiklutir, tilgongdir og vegleiðingar, ið tryggja, at burðardygd verður flættað inn í okkara kjarnuvirksemi.

Politikkurin er eisini grundarlagið undir arbeiðinum hjá burðardygdarnevndini og -bólkinum. Hann byggir á fimm mál:

1. at flætta burðardygd inn í alt okkara virksemi,
2. menna burðardyggar vørur og tænastur,
3. samansjóða burðardygd við raksturin,
4. tryggja greitt og gjøgnumskygt samskifti um burðardygd, og
5. almannakunngera $CO_2$-útlát við greiðum minkingarmálum.

Nærri kunning er at finna í hesi frágreiðing og við at fylgja leinkjuni <u>her.</u>

**Mannarættindi**
Vit virða altjóða viðurkend mannarættindi og hava atlit at hesum á øllum mótum í virkseminum í Føroyum og í Grønlandi. Hetta arbeiðið kemur til sjóndar í okkara mannagongdum og politikki, herundir burðardygdarpolitikkurin, AML/ CFTpolitikkurin, dátuetiska politikkurin og politikkurin fyri góða virkismentan.

Hesir karmar binda okkum til ábyrgdarfullan rakstur, rættvís arbeiðsviðurskifti, integritet og álítandi kundaviðurskifti í samsvari við viðkomandi altjóða standardar.

Í sambandi við íløgur verður virðingin fyri mannarættindum eisini tryggjað gjøgnum samstarv við uttanhýsis kapitalfyrisitarar, eitt nú BankInvest, sum í sínum arbeiði hevur atlit at ESG og altjóða mannarættindastandardum í sínum tænastum.



# Burðardygd

## Mál

Síðan 2018 hava vit fylgt Heimsmálunum hjá ST fyri burðardygd (SDG) sum útgangsstøði fyri okkara arbeiði við burðardygd. Vit hava valt at leggja dent á fimm heimsmál, sum eru viðkomandi fyri okkara virksemi, og sum vit hava ítøkiliga ávirkan á:

- **Góðska í útbúgving (SDG 4)**
- **Javnstøða millum kynini (SDG 5)**
- **Sømilig arbeiði og búskaparligur vøkstur (SDG 8)**
- **Burðardyggir býir og burðardygg samfeløg (SDG 11)**
- **Veðurlagsátøk (SDG 13)**

Í 2023 eftirmettu vit, um samsvar var millum heimsmálini og virksemið hjá okkum. Vit staðfestu, at okkara raðfestingar og strategi eru í tráð við heimsmálini, og í 2024 váttaði okkara DMA hetta samsvarið.

Vit arbeiða áhaldandi við at menna okkara tilgongd til burðardygd, so vit í størstan mun liva upp til heimsmálini hjá ST.

Vit vísa á hesi fimm málini í vinstra bredda í allari frágreiðingini, har tey eru viðkomandi.



8 DECENT WORK AND ECONOMIC GROWTH

11 SUSTAINABLE CITIES AND COMMUNITIES

# Burðardygd

## Búskaparliga ávirkan

Okkara máti at reka okkara virksemi hevur stóra ávirkan á búskaparligu støðuna í teimum samfeløgunum, sum vit virka í. Okkara góða fíggjarliga úrslit ger okkum til ein týðandi skattgjaldara bæði í Føroyum og Grønlandi. Eisini eru vit eitt stórt arbeiðspláss og rinda sostatt lutfalsliga nógv í lønum, sum elva til skattainntøkur hjá landinum.

Harumframt leggja vit dent á at velja lokalar veitarar í okkara virðisketum, tá ið tað ber til. Okkara eigaraskapur er eisini væl grundaður í Føroyum. Áleið **54%** av eigaraskapinum er á føroyskum hondum, og umleið **5.400 føroyingar** eru íleggjarar, sum sostatt hava fingið lut í vinningsbýtinum. **Føroya Landsstýri eigur áleið 35%** av samtakinum, og landið fær sostatt ein stóran part av vinningsbýtinum.

Hvørt ár lata vit eisini stuðul til nærumhvørvið. Við støði í lønarútreiðslum, innkeypi, partafelagsskatti, vinningsbýti og stuðli til lokala samfelagið kunnu vit vera við til at styrkja lokala búskapin og fremja langtíðarhaldføri.

**Beinleiðis búskaparlig ávirkan 2025 (DKKm)**

| | 2025 | 2024 | 2023 |
|---|---|---|---|
| Lønarútreiðslur | 167,2 | 164,2 | 164,4 |
| Veitaraútreiðslur | 132,9 | 117,1 | 109,4 |
| Partafelagsskattur | 67,6 | 72 | 72 |
| Vinningsbýti | 202 | 350 | 80 |
| Stuðul til nærumhvørvið | 2,4 | 2,7 | 2,3 |

# ESG

## Nýggj mál fyri 2030

Fyri at arbeiða ítøkiligt og strategiskt við burðardygd eru ESG-lyklatøl og ESG-mál neyðug. Bæði ESG-lyklatølini og Paríssáttmálin eru við til at málrætta okkara arbeiði við burðardygd og at flætta burðardygd inn í okkara samlaða virksemi.

**Vav 1 og 2**
Í 2025 beindu vit fyri beinleiðis útláti (vav 1), og vit arbeiða miðvíst fram móti at minka vav 2-útlát fram til 2030. Samstundis styrkja vit dygdina á okkara vav 3-dátum gjøgnum tættari samstarv við samstarvspartar.

**Vav 3**
Okkara størsta ávirkan í grønu umleggingini liggur í vav 3, sum er útlát í okkara útlánum og íløgum. Tí leggja vit stóran dent á at menna og betra dátugrundarlagið, sum er ein fortreyt fyri at seta og fremja haldgóð minkingartiltøk.

**Mál fyri 2030**
Við støði í hesum arbeiðinum seinastu árini hava vit í 2025 dagført okkara ESG-mál fyri 2030. Sostatt tryggja vit, at vit framhaldandi arbeiða bæði ítøkiligt og strategiskt við burðardygd í árunum, sum koma.

**Ætlan fyri framman**
Í 2026 fara vit framhaldandi at leggja dent á ábyrgd og opinleika í okkara ESG-frágreiðing. Hóast avgerðin í ES um at seta Corporate Sustainability Reporting Directive (CSRD) í bíðistøðu undir sonevndu Omnibus "stop-the-clock"-skipanini, og at vit hervið eru frítikin CSRD-krøvunum, so halda vit fast við eina greiða og gjøgnumskygda tilgongd til ESG.

**ESG-lyklatøl**
Sí okkara ESG-lyklatøl og ESG-mál á næstu síðu.



# ESG lyklatøl

| Umhvørvi | Eind | Mál (2030) | Mál (2025) | 2025 | 2024 | 2023 | 2022 | 2021 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Co2e, vav 1 | Tons | 0 | 0 | 8,4 | 27,1 | 98,3 | 93,7 | 118,7 |
| Co2e, vav 2 | Tons | 188 | 170 | 212,3 | 216,0 | 218,6 | 230,5 | 281,5 |
| Orkunýtsla | GJ | 4.000 | 4.200 | 3.558 | 4.177 | 4.860 | 4.878 | 5.033 |
| Varandi orka | % | 70 | 65 | 46,4 | 45,9 | 35,4 | 38,9 | 30,3 |
| Arbeiðsferðsla | Tons | - | - | 73,9* | 53,4* | - | - | - |

| Fólk | Eind | Mál (2030) | Mál (2025) | 2025 | 2024 | 2023 | 2022 | 2021 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Arbeiðsstyrki | Starvsfólk | | | 203 | 209 | 205 | 200 | 202 |
| Kynsbýti | % | 40-60 | 40-60 | 60 | 61 | 61 | 63 | 64 |
| Kynsbýti á leiðslustigi | % | 40-60 | 40-60 | 49 | 49 | 50 | 49 | 50 |
| Lønarmunur millum kyn | Ferðir | | | 1,3 | 1,3 | 1,3 | 1,2 | 1,2 |
| Starvsfólkaskifti | % | 7 | 7 | 4,7 | 6,8 | 11,1 | 6,7 | 16,3 |
| Sjúkrafrávera | Dagur/starvsfólk | 5 | 5 | 8,5 | 7,3 | 8,6 | 10,9 | 8,6 |

| Leiðsla | Eind | Mál (2030) | Mál (2025) | 2025 | 2024 | 2023 | 2022 | 2021 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Kynsbýti í nevnd | % | 40-60 | 40-60 | 16,7 | 20,9 | 40,0 | 40,0 | 20,0 |
| Uppmøting til nevndarfundir | % | 100 | 100 | 96 | 97 | 95 | 96 | 100 |
| Lønarmunur, forstjóri og starvsfólk | Ferðir | - | - | 5,9 | 5,8 | 5,9 | 6,5 | 6,7 |

| Annað | Eind | Mál (2030) | Mál (2025) | 2025 | 2024 | 2023 | 2022 | 2021 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Net Promoter Score | Stig | >65 | >60 | 65 | 61 | 58 | 45 | 61 |

*Einans føroyski parturin

4 QUALITY EDUCATION

11 SUSTAINABLE CITIES AND COMMUNITIES

# ESG

## At byggja burðardygg samfeløg

Okkara mál er at økja um tilvitanina hjá kundum um loysnir innan varandi orku og styrkja okkara leiklut sum ein týðandi samstarvsfelagi í arbeiðinum fyri eina burðardygga framtíð. Vit menna javnan okkara vørur og tænastur, so tær stuðla undir hesa umlegging, tá ið tað er fíggjarliga haldbært.

**Undirvísa ráðgevum í burðardygd**
Fyri at økja um vitanina hjá okkara starvsfólkum hava vit skipað fyri undirvísing í burðardygd.
Skeiðini geva ráðgevum neyðuga vitan og amboð at ráðgeva kundunum.

Í 2023 høvdu allir vinnukundaráðgevar lokið eitt skeið um burðardygga samrøðu. Í 2024 luttóku harumframt 60 privatkundaráðgevar í Føroyum og Grønlandi í innanhýsis undirvísing um sama evni.

Í 2025 bygdu vit víðari á hetta grundarlag við at skipa fyri framhaldsskeiðum fyri bæði vinnu- og privatkundaráðgevum. Endamálið var at styrkja førleikarnar at føra innihaldsríkar samrøður um burðardygd við kundar okkara og tryggja, at ráðgevar eru væl førir fyri at vegleiða í einum øki, sum er í skjótari menning.

Við støði í okkara fakligu førleikum og teimum tænastunum, sum vit bjóða, halda vit fram at stuðla okkara kundum í at velja varandi orkuloysnir og sostatt vera við í burðardyggu menningini.

**Orkukvøld**
Í 2025 vóru vit viðfyriskiparar av átta “Orkukvøldum” kring Føroyar í samstarvi við Effo. Endamálið við tiltøkunum var at upplýsa um varandi orku og grøna umlegging. Á myndini til høgru sæst Katrin Á. Hansen, privatkundaráðgevi, fyrireika seg til at leggja fram okkara tænastur, sum eru viðkomandi í sambandi við grønu umleggingina.



13 CLIMATE ACTION

# ESG

## At minka okkara ávirkan á umhvørvið

Síðstu fimm árini hava vit dagført og hækkað okkara ESG-mál, har serligur dentur hevur verið lagdur á at beina fyri øllum beinleiðis útláti frá brenning av olju og bensini innan 2025.

**Vav 1, 2 og 3**
Í 2024 náddi samtakið ein týðandi varða, tá ið vit komu á mál við umleggingini til elbilar. Í 2025 komu vit á mál við at taka tær seinastu hitaskipanirnar, ið nýttu fossil brennievni, úr rakstrinum. Hetta tryggjar, at vit so at siga einki beinleiðis útlát (vav 1) hava longur.

Umframt vav 1 halda vit fram við arbeiðinum um at minka um útlát frá el og hita (vav 2) fram móti 2030. Harumframt arbeiða vit við at handfara vav 3-útlát við at betra dygdina á dátum, ið knýta seg at okkara lánum og íløgum.

Seinastu trý árini hava vit almannakunngjørt tøl, hóast avbjóðingar hava verið knýttar at tøkniligari dátutøkni. Í 2025 sóu vit tó ítøkilig framstig í menningini av haldgóðum mannagongdum, serliga gjøgnum samstarv við aðrar fíggjarstovnar og viðkomandi myndugleikar.

Í okkara arbeiði við vav 3 leggja vit serligan dent á útlát knýtt at billánum, bústaðarlánum og vinnuligum virksemi. Hetta leggur grundarlag fyri neyvari frágreiðing og fyri komandi minkingum í útláti.

Øll hesi framstig vísa okkara greiðu ætlan um at røkka settum málum, styrkja ábyrgdina og at fremja verulig framstig ímóti einari burðardyggari framtíð.

> Í 2025 komu vit á mál við at taka tær seinastu hitaskipanirnar við beinleiðis útláti úr rakstrinum.



13 CLIMATE ACTION

# ESG

## $CO_2$-útlát frá lánum

Samandráttur

- $CO^2$-útlát frá lánum eru roknað til **59.889 tons**.
- Útrokningin gevur eina ábending um høvuðskeldurnar til $CO_2$-útlát frá útlánum hjá samtakinum.
- Broytingin í $CO^2$-fótasporinum frá 2024 er óviss orsakað av ymiskari dátugóðsku og manglandi samanbering við 2025.
- Vit fara at halda fram við at betra um dátugóðskuna í samstarvi við veitarar, myndugleikar og aðrar fíggjarstovnar í 2026.

**Tabell 1 (Føroyar og Grønland):** CO2-útlát frá lánum við ársenda 2025

| | Lán (DKK m) | Partur | Útlát $CO_2e$ tons* | Partur av útlátinum | Útlátsintensitetur Útlát í $CO_2e$ tons /DKKm |
|---|---|---|---|---|---|
| **Húsalán** | - | - | - | - | - |
| **Billán** | 333,3 | 6,1% | 1.525 | 2,5% | 4,6 |
| **Vinna** | 5.165,2 | 93,9% | 58.364 | 97,5% | 11,3 |
| **Samlað** | 5.498,5 | 100% | 59.889 | 100% | 10,9 |

* Samlað CO2-útlát í tonsum roknað í CO2-equivalent (CO2e)

13 CLIMATE ACTION

# ESG

## $CO_2$-útlát frá íløgum

Samandráttur

- $CO_2$-útlát frá íløgum eru roknað til **76.966 tons**.
- Útrokningin gevur eina ábending um høvuðskeldurnar til CO2-útlát frá íløgum hjá samtakinum
- Broytingin í $CO_2$- útlátinum frá 2024 er óviss orsakað av ymiskari dátugóðsku og manglandi grundarlagi fyri samanbering.
- Vit fara at halda fram við at betra tænasturnar í 2026 fyri at stuðla kundum í at taka burðardyggar íløguavgerðir.

**Tabell 2 (Føroyar og Grønland):** Mett útlát í íløgum 31. desember 2025 fyri fíggjarárið 2025

| | Marknaðarvirði (DKK m) | Partur av marknaðarvirði | Útlát* | Útláts-intensitetur** | Partur av útlátinum |
|---|---|---|---|---|---|
| **Íløgurøkt, Føroyar** | 2.110,3 | 91,7% | 57.452 | 33,7 | 92,3% |
| **Íløgurøkt og íløgubólkar, Grønland** | 190,1 | 8,3% | 1.194 | 31,3 | 7,7% |
| **Íløgur samlað** | 2.300,3 | 100% | 76.966 | 33,5 | 100% |

*Samlað CO2-útlát í tonsum CO2e
**Tons CO2e fyri hvørja million DKK í íløgum

4 QUALITY EDUCATION

8 DECENT WORK AND ECONOMIC GROWTH

# ESG

## Lán og burðardygd

**Fígging av grønu umleggingini**
Okkara mál er at stuðla kundum okkara í fíggjarligu umleggingini til burðardyggar loysnir við at bjóða bæði fíggjarligar fyrimunir og fakliga ráðgeving. Vit halda fram við at bjóða kappingarførar fíggarloysnir, eitt nú lán til elbilar, lán til orkubetringar í bústøðum og loysnir innan burðardygga orku. Hetta ger tað lættari og ofta bíligari hjá kundum at velja burðardyggar loysnir, til dømis at bjálva, skifta vindeygu ella leggja um til varandi orkukeldur. Sostatt kunnu vit hjálpa kundum at velja loysnir, sum hava góða ávirkan á umhvørvið. Vøksturin í lánum, ið eru nevnd omanfyri, seinastu árini er eitt greitt dømi um hesa menning.

**Varandi Vinna**
Vit eru framvegis virkin limur í Varandi Vinna, sum er eitt burðardygdarnetverk, ið Vinnuhúsið skipar fyri. Í 2024–2025 var okkara forstjóri limur í nevndini í eitt ár, áðrenn leikluturin varð latin víðari til ein annan forstjóra í eini aðrari limafyritøkunum.

Í hesum tíðarskeiði luttóku vit í trimum netverksfundum, har vit fingu virðismikla vitan um ESG-skránna í Føroyum og samstundis fingu høvið at greiða frá okkara egnu royndum og sjónarmiðum um møguleikar og avbjóðingar á økinum.

Framyvir gleða vit okkum til framhaldandi samstarv við tær meira enn 30 limafyritøkurnar í netverkinum. Endamálið er at menna ESG-skránna víðari, styrkja felags lærdóm og vera við til at ávirka burðardyggar arbeiðshættir í vinnulívinum.



Framhaldandi vøkstur í grønum lánum í 2025

| Í DKK | 2021 til 2022 | 2022 til 2023 | 2023 til 2024 | 2024 til 2025 |
|---|---|---|---|---|
| Grønt bústaðarlán | 97,6% | 95,6% | 46,8% | 22,0% |
| Orkulán | 44,0% | 47,8% | 32,7% | 13,6% |

8 DECENT WORK AND ECONOMIC GROWTH

13 CLIMATE ACTION

# ESG

## Íløgur og burðardygd

**Íløgutænastur við denti á burðardygd**
Vit veita íløgutænastur, sum eru lagaðar eftir tørvinum og váðafýsninum hjá einstaka kundanum. Umframt persónliga ráðgeving, bjóða vit eisini burðardyggar íløguloysnir.

Hetta er fimta árið á rað, at vit fáa og nýta dátur um CO2-útlát frá okkara íløgum. Hesi innlit gera okkum før fyri at eftirmeta og minka um umhvørvisligu ávirkanina av íløgutænastunum hjá samtakinum. Við betri dátagrundarlagi frá fyritøkum økist gjøgnumskygnið.

**Samstarv innan burðardygd**
Í samstarvi við BankInvest verða CO2-útlát í okkara íløgutænastum mátað og minkað. Hetta gevur okkara kundum skjalprógv fyri og størri gjøgnumskygni innan umhvørvi, samfelag og leiðslu (ESG).

**9 ár á fremsta plássi**
Í 2025 varð BankInvest enn einaferð kosið sum besta íløgufyritøka í árligu nøgdsemiskanningini Prospera Fund Distributors & Selectors, sum Kantar Prospera stendur fyri. Hetta er níggjunda árið á rað, at BankInvest fær hesa viðurkenning og sostatt heldur fast í fyrsta plássinum frammanfyri fyritøkur so sum Sparinvest, Sydinvest, Storebrand og C Worldwide.

Við hægsta úrsliti, sum nakrantíð er skrásett í kanningini, vísir BankInvest framvegis sera góð úrslit í øllum flokkum. Hetta er ein endurspeglan av dugnaligum og miðvísum starvsfólkum, umframt tøttum samstarvi við samstarvsfelagar. Vit eru sera fegin um hetta samstarvið við BankInvest.

Les meira um avrikini hjá BankInvest her.




KANTAR
Shape your brand future
PROSPERA

5 GENDER EQUALITY

# ESG

## Javnstøða millum kynini

**Javnstøði í leiðslu**
Javnstøða millum kynini hevur fylt nógv í okkara arbeiði. Í 2025 er leiðslutoymið framvegis samansett av líka so nógvum kvinnum sum monnum. Hetta endurspeglar eina støðuga menning síðani 2018, tá kvinnur umboðaðu einans 31% av leiðslustørvum.

Vit arbeiða fyri einari javnvág, har einki kyn verður umboðað við meira enn 60% í leiðslu og á deildum. Fyri at stuðla javnari møguleikum bjóða vit menningarmøguleikar til øll starvsfólk.

**Lønarmunur millum kyn**
Arbeiðið at minka um lønarmunin millum kynini er eisini ein týðandi raðfesting, og seinasta greiningin staðfestir javna løn fyri javnt arbeiði. Harumframt stuðla vit felags barnsburðarfarloyvi og smidligum arbeiðsumstøðum fyri at styrkja javnvágina millum arbeiði og familjulív.

**Ítøkilig átøk**
Í 2024 settu vit í verk eina nýggja skipan, sum gevur starvsfólkum møguleika at arbeiða 30 tímar um vikuna við fullari løn, um tey venda aftur til arbeiðis seinastu mánaðirnar av barnsburðarfarloyvinum. Skipanin ger tað møguligt hjá starvsfólkum at koma aftur til arbeiðis, tá barnið er millum seks mánaðir og eitt ár.

Vit hava eisini tillagað okkara setanartilgongd við tí endamáli at eggja fjølbroyttum umsøkjarum at søkja og taka kynsbýtið við í metingina, tá ið nýggj starvsfólk verða sett.

Í 2026 fara vit framhaldandi at byggja víðari á hesi átøkini fyri at varðveita eina javna umboðan í samtakinum og styrkja fjølbroytni á øllum stigum í skipanini.

Kynsbýti á leiðslustigi






Í 2025 var kynsbýtið á leiðslustigið 49% kvinnur. Til samanberingar var talið 31% í 2018.

8 DECENT WORK AND ECONOMIC GROWTH

# Áhugapartar

## Íleggjarar

**Íløgu**r
Íleggjarar leggja í vaksandi mun dent á opinleika, serliga í sambandi við burðardygd og samfelagsábyrgd, og tí halda vit fram at arbeiða fyri at liva upp til hesar væntanir. Tað er tí týðandi fyri okkara virkisgrundarlag, at vit samskipa alt okkara arbeiði í tráð við altjóða reglur og raðfestingar hjá íleggjarum.

Føroya Banki hevur ein lutfalsliga stóran føroyskan eigaraskap. Áleið **10. hvør føroyingur** eigur í Føroya Banka ella gott **5.400** føroyingar, sum eiga **54%** av samtakinum.

**Opinleiki**
Sum ein børsskrásett fyritøka hevur opinleiki alstóran týdning. Vit leggja dent á greiða og viðkomandi kunning gjøgnum ymiskar samskiftisrásir, undir hesum regluligar fráboðanir, ársfrágreiðingar, nágreinilig fíggjarlig tøl, dagføringar um partabrævakurs, og beinleiðis samskifti við íleggjarar.



8 DECENT WORK AND ECONOMIC GROWTH

11 SUSTAINABLE CITIES AND COMMUNITIES

13 CLIMATE ACTION

# Áhugapartar

## Kundar

**Styrkja sambondini við kundar okkara**
Vit arbeiða fyri at byggja varandi sambond við okkara kundar grundað á álit, ábyrgd og felags virði. Við eldhuga, fakligum førleikum og virknari tilgongd halda vit fram at styrkja okkara núverandi kundagrundarlag, samstundis sum vit bjóða nýggjum kundum vælkomnum. Henda tilgongd er tætt knýtt at okkara arbeiði við samfelagsábyrgd og okkara fatan av, at hvørt einstakt kundasamband er ein hornasteinur í okkara virksemi.

**At lurta eftir tí, sum hevur týdning**
Afturmelding frá kundum er avgerandi fyri, at vit kunnu menna okkara tænastur og styrkja sambondini. Gjøgnum regluligt samskifti, marknaðarkanningar og nøgdsemiskanningar arbeiða vit støðugt við at betra kundaupplivingina.

Í 2025 tóku vit fleiri stig til at arbeiða víðari við úrslitum úr hesum kanningum, serliga við atliti at skjótari og betri viðgerðum, at byggja álit og menna okkara innanhýsis mannagongdir.

**Betri NPS-úrslit**
Vit eru errin av at kunna staðfesta, at okkara Net Promoter Score (NPS*) bleiv enn betri í 2025 og nú er 65. Hetta er væl omanfyri okkara mál um meira enn 60 og vísir eina støðuga menning í nøgdsemi og trúfesti hjá kundum – eisini fyrr enn væntað. Stóra arbeiðið og eldhugin hjá starvsfólkum okkara hevur verið avgerandi fyri hetta góða úrslitið. Starvsfólkini tryggja eitt høgt tænastustøði og virkið samskifti við kundar okkara. Úrslitini undirstrika okkara vilja at menna kundaupplivingina og veita ráðgeving og tænastur, sum veruliga gera mun.

| Mál fyri 2030 | Mál fyri 2025 | 2025 | 2024 | 2023 |
|---|---|---|---|---|
| >65 | >60 | 65 | 61 | 58 |

*Net Promoter Score (NPS) er ein einfaldur máti at máta, hvussu nøgdir kundar eru, og hvussu sannlíkt tað er, at teir fara at mæla eina fyritøku ella tænastu til onnur.



Net Promoter Score (NPS) omanfyri 60, sum var okkara mál fyri 2025.

4 QUALITY EDUCATION

8 DECENT WORK AND ECONOMIC GROWTH

# Áhugabólkar

## Starvsfólk

At draga at okkum og at varðveita virkin og dugnalig starvsfólk er framvegis ein hornasteinur í okkara arbeiði. Starvsfólkini eru okkara týdningarmesta tilfeingi, og teirra eldhugi og førleikar eru ein týðandi drívmegi aftan fyri okkara framgongd.

Í 2025 styrktu vit hetta arbeiðið víðari við at brúka meira enn 4.500 tímar til menningartiltøk fyri starvsfólk. Hetta svarar til umleið 22 tímar fyri hvørt full-tíðarstarvsfólk.

**Faklig og sosial átøk**
Okkara tilgongd til starvsfólk fevnir um bæði høvd og hjarta. Starvsfólk skulu hava møguleika at menna seg fakliga og samstundis vera partur av einum góðum sosialum felagsskapi. Harafturat arbeiða vit miðvíst við at skapa eitt arbeiðsumhvørvi, har øll starvsfólk hava eina góða javnvág millum arbeiðstíð og frítíð

Frá innanhýsis undirvísing til uttanhýsis skeið og útbúgvingarmøguleikar leggja vit dent á støðuga læring og menning.

Harafturat raðfesta vit eina stuðlandi og livandi arbeiðsmentan. Hervið styrkja vit trivnaðin og arbeiðsnøgdsemið og samstundis leggja grundarlagið undir framtíðina hjá okkum sum fyrtøku og arbeiðsplássi.

**At gera mun saman**
Teir eyka tímarnir, sum vórðu lagdir í menning í 2025, endurspegla ikki bert okkara dent á fakliga menning, men eisini okkara breiðari íkast til trivnað í samfelagnum. Vit eru errin av at røkta eina mentan, sum gevur einstaklingum møguleika at trívast, styrkir samstarvið og økir um jaligu ávirkanina, sum samtakið hevur á samfelagið.

Starvsfólk okkara eru framvegis grundarlagið undir øllum, vit røkka. Teirra førleikar, eldhugi og trúfesti eru drívmegin aftan fyri okkara úrslit — og saman mynda vit eina bjartari framtíð fyri starvsfólkini, kundarnar og tey samfeløg, vit eru partur av.



**Starvsfólkanøgdsemiskanning**
Fyri at tryggja at vit gera okkara arbeiði gott nokk, gera vit eina árliga kanning, har øll starvsfólk sleppa at siga sína hugsan um okkum sum arbeiðspláss. Úrslitini vísa okkum, hvat riggar, og hvat vit kunnu gera betri. Henda vitanin er ein týdningarmikil partur av arbeiðinum at menna okkara arbeiðsmentan og seta í verk ítøkiligar betringar. Í 2025 var úrslitið methøgt, tá talan er um arbeiðsnøgdsemi og trúfesti.

**Jobmatch**
Í 2025 luttók samtakið í árliga Jobmatch-tiltakinum, har vit høvdu høvi at vísa fram Føroya Banka sum eitt áhugavert arbeiðspláss fyri komandi starvsfólk. Okkara toymi hevði fleiri góðar og gevandi samrøður við vitjandi. Sí myndina av bási okkara, har vitjandi vórðu biðin um at siga, hvat tey meta vera tey týdningarmestu viðurskifti á einum arbeiðsplássi.




Starvsfólkanøgdsemiskanning í samstarv við Ennova 2025.



# Áhugapartar

## Næmingar útlærdir

Í 2025 fingu allir tríggir bankanæmingarnir, sum byrjaðu útbúgvingina í 2023, prógv. Ein teirra hevur valt at halda fram við víðari lesnaði, meðan hini bæði hava valt at halda fram at arbeiða sum kundaráðgevar her í samtakinum.

Tað er gleðiligt at síggja og fylgja við í teirra menning og samstundis eisini síggja ágóðan, sum samtakið fær burtur úr tí at seta næmingar, sum síðani gerast starvsfólk her ella velja at byggja víðari á sína vitan og royndir í samtakinum.

Við at taka næmingar inn styrkja vit førleikarnar hjá yngru ættarliðunum, og samstundis er hetta ein langtíðaríløga í støðufesti, kappingarføri og nýhugsan hjá samtakinum.

Í 2025 vórðu hesir tríggir næmingarnir lidnir við sína útbúgving. Frá vinstru á myndini:

**Jákup N. Vilhelmsen**
**Marianna Nielsen**
**Rógvi Ellendersen**



# Áhugapartar

## Hægri útbúgving

Í 2025 hátíðarhildu vit enn einaferð starvsfelagar, sum hava lokið víðari útbúgving, og hetta var samstundis eisini eitt vitni um okkara miðvísa arbeiði við førleikamenning.

Í farna ári fingu fleiri starvsfólk prógv innan øki sum váðastýring, leiðsla, vinna og trygging.

Førleikamenning er umráðandi fyri bæði tann einstaka og samtakið. Vit eru errin av tí arbeiði, sum starvsfólk okkara vísa, tá tey velja at fara undir víðari útbúgving, samstundis sum tey røkja sítt arbeiði. Avrikini eru somuleiðis við til at styrkja okkara kappingarføri og tryggja fakliga haldførið.

Hjartaliga til lukku til øll starvsfólk, ið hava lokið útbúgving og skeið í 2025.



### Hægri útbúgvingar loknar 2025

- Petur Ingvar Bjellvåg: finans trainee
- Hanus  Mikkelsen: góðkendur tryggingarráðgevi
- Janie W. Høgnesen: finans trainee
- Barbara Djurhuus: AFR
- Elsubet Simonsen: AFR
- Berit W. Samuelsen: góðkendur tryggingarráðgevi
- Karl Marius Dahl: finans trainee
- Joan M Joensen: finans trainee
- Jenny H. Davidsen: finans trainee

# Áhugabólkar

## 4 ferðir 40 ár

Vit eru heppin at hava trúføst og dugnalig starvsfólk, har fleiri av teimum hava verið í starvi í nógv ár. Vit hava í dag ein miðalstarvsaldur, sum er 15 ár. Tað er ein rættiliga høgur starvsaldur samanborið við aðrar fyritøkur í Føroyum og uttanlands.

Vit raðfesta at varðveita dugnalig starvsfólk, og høgi starvsaldurin er eitt tekin um bæði trúfesti og langtíðar tilknýti til arbeiðsplássið. Í 2025 høvdu vit tilsamans sjey hálvrundar og rundar starvsdagar (25 ár og 40 ár).

**Turid, Karolina, Eyðna og Gunn**
Í 2025 hátíðarhildu vit m.a. starvsdagar hjá Turid, Karolinu, Eyðnu og Gunn, sum í mong ár hava verið ein týðandi partur av Føroya Banka. Við sínum trúfesti, royndum og dagliga íkasti hava tær verið við til at mynda arbeiðsdagin og menningina hjá bankanum seinastu 40 árini.

Starvsdagarnir vórðu hátíðarhildnir saman við starvsfeløgum, familju og vinum, har høvi var at hyggja aftur á mong góð ár, deila søgur og vísa takk-semi fyri teirra stóra íkast.

Teirra eldhugi, fakligu førleikar og góða lyndi hava havt stóran týdning fyri bæði starvsfelagar og kundar, og vit eru takksom fyri tað arbeiðið og trúfestið, sum tær hava víst okkum sum bæði arbeiðspláss og fyritøku gjøgnum árini.




**Frá vinstru ovast:** Turid J. Jacobsen, Karolina Simonsen, Eyðna Joensen & Gunn L. Olsen

4 QUALITY EDUCATION
8 DECENT WORK AND ECONOMIC GROWTH
11 SUSTAINABLE CITIES AND COMMUNITIES
13 CLIMATE ACTION

# Áhugapartar

## Lokalsamfelagið

Vit virka bæði í Føroyum og Grønlandi, og tað hevur týdning fyri okkum, at vit kunnu hava eina góða ávirkan á tey samfeløgini, sum vit eru partur av. Samstundis er tað avgerandi fyri okkara virksemi og menning, at hesi samfeløgini eisini virka væl. Niðanfyri eru nøkur dømi um ítøkiligt arbeiði, sum vit gera fyri at stuðla lokalsamfelagnum, sum vit eru partur av.

**Bankivik-legatið**
Bankivik-legatið er ætlað lesandi, sum fara undir hægri útbúgving. Endamálið er at veita fíggjarligan stuðul undir lesnaðinum og gera tað lættari at bera dagligu útreiðslurnar. Legatið á 25.000 krónur verður latið tveimum persónum tvær ferðir um árið. Lesandi í bæði í og uttanfyri Grønland kunnu søkja legatið. Tað kann eisini nýtast í sambandi við styttri lestraruppihald uttanlands ella ólønta starvsvenjing.

**Avtala við Kvinnuhúsið**
Føroya Banki hevur gjørt eina samstarvsavtalu við Kvinnuhúsið í Føroyum um at stuðla og hjálpa persónum í viðkvæmum og truplum støðum. Samstarvið hevur til endamáls at bjóða trygga og persónliga fíggjarliga ráðgeving, ið tekur støði í støðuni og tørvinum hjá tí einstaka. Kvinnuhúsið veitir stuðul til persónar, sum eru raktir av likamligum, sálarligum og/ella fíggjarligum harðskapi.

**UArctic Congress 2026**
Vit gleða okkum eisini til komandi ár, tá Føroya Banki verður ein av høvuðsstuðlunum til UArctic Congress, sum verður hildin í Føroyum í 2026. Avtalan varð undirskrivað við Fróðskaparsetur Føroya í 2025.



# Átøk

## Stuðul og íkast í 2024

Onnur dømir um ítøkilig átøk, sum vit gera fyri at stuðla teimum samfeløgunum, vit eru partur av, eru stuðul, ið vit bólka í tríggjar bólkar: mentan, ítróttur og vælgerandi endamál.

Í 2025 settu vit áleið somu upphædd av sum undanfarin ár, og sostatt hildu vit fram at stuðla menning, møguleikum og trivnaði í teimum samfeløgum, vit eru partur av.

Í 2026 er ætlanin at stuðla við áleið tí sama sum undanfarnu árini.




**Stuðul í 2025**

- ✓ Framhaldandi stórur stuðul til ítrótt, mentan og útbúgving
- ✓ Legat, sum geva ungum lesandi møguleika at fylgja sínum lestri og dreymum
- ✓ Stuðul í 2025 á sama stigi sum undanfarin ár (umleið 2,4 mió. kr.)
- ✓ Afturvendandi mál at geva aftur til lokalsamfeløgini, sum vit eru partur av

# Átøk
## Lokalar stuðulsavtalur

**B-67**
Vit eru høvuðsstuðul hjá B-67, sum er eitt fótbóltsfelag í Nuuk, og sum ger eitt megnar arbeiði at menna ungar spírar og samstundis eisini at stuðla trivnaði hjá børnum og ungum. Vit eru errin av samstarvinum, tí arbeiðið hjá B-67 er við til at styrkja ítróttarmentanina í Grønlandi. Ein styrkt ítróttarmentan er heilsufremjandi – bæði fyri kropp, sál og felagsskap.

**Errin høvuðsstuðul hjá HSF**
Vit hava síðani 2016 verið errin høvuðsstuðul hjá Hondbóltssambandi Føroya (HSF). Í 2025 endurnýggjaðu vit samstarvsavtaluna og halda fram sum høvuðsstuðul fram til 2027. Við hesum verður okkara stuðul til føroyskan hondbólt longdur til meira enn eitt áratíggju.

**Minniligar løtur**
Í 2025 rakk føroyska kvinnulandsliðið í hondbólti enn ein søguligan varða, tá tær luttóku í HM-endaspælinum í Trier í Týsklandi. Har eydnaðist tað liðnum at vinna sín fyrsta sigur í einum HM-endaspæli og tryggja sær pláss í miðumfarinum.

Vit vóru við allan vegin og stuðlaðu liðnum á hesi serligu ferðini saman við áskoðarum og øðrum stuðlum, sum vóru við til at skapa minniligar løtur til og ímillum dystirnar.

Vit gleða okkum at halda fram við hesum samstarvi og at stuðla framhaldandi menningini av føroyskum hondbólti komandi árini.

**Badminton og Trygd**
Vit eru errin av at stuðla Badmintonsamband Føroya, sum ger eitt týdningarmikið arbeiði fyri at menna badminton í Føroyum og skapa góðar karmar fyri børnum og ungum.

Í 2024 undirskrivaðu Trygd og Badmintonsamband Føroya eina 2 ára avtalu, har Trygd er høvuðsstuðul hjá badmintonítróttini. Avtalan tryggjar støðugan stuðul til víðari menning av ítróttini, sum seinastu árini hevur havt góða framgongd – bæði heima og uttanlands.

Vit eru glað fyri samstarvið og at vera við til at styrkja føroyskan badminton.

> **Errin høvuðsstuðul hjá føroyskum hondbólti**
> **Í 2025 endurnýggjaðu vit samstarvsavtaluna við HSF og halda fram sum høvuðsstuðul. Vit hava verið høvuðsstuðul hjá HSF síðani 2016.**



# Átøk

## Høvuðsstuðul hjá Eydnudeildini

Vit eru eisini errin av at vera høvuðsstuðul hjá Eydnudeildini. Eydnudeildin er eitt tilboð til børn og ung við serligum tørvi og hevur verið virkin í Føroyum í seks ár.

Sum høvuðsstuðul kunnu vit vera við til at menna góða arbeiðið, sum Eydnudeildin ger fyri børnini, tey ungu og familjur teirra. Undir evropeisku hondbóltskappingini í Berlin í januar 2024 seldu okkara starvsfólk saman við øðrum stuðlum blusur, har helvtin av inntøkunum fór til Eydnudeildina. Samlaða upphæddin gjørdist 100.000 DKK, sum varð handað limum í Eydnudeildini í Føroya Banka í juni 2024. Vit vóna, at hetta íkastið kann stuðla teirra virðismikla arbeiði. Stuðlarnir til átakið vóru Føroya Banki, Wenzel, Atlantic Airways, Effo og Smyril Line.

Í 2025 hava vit framhaldandi stuðlað og samstarvað við Eydnudeildina og fara at gera tað í 2026, soleiðis at Ednudeildin kann geva børn, ungum og familjum betri fortreytir at savnast og fáa góðar upplivingar saman.



4 QUALITY EDUCATION

# Átøk

## At kveikja lesihugin

At lesa er ein týðandi lykil til vitan, og tí valdu vit aftur í 2025 at lata eina bók til øll børn, sum byrjaðu í 1. flokki.

**At styrkja tilknýtið til føroyska málið**
Samstarv okkara við Bókadeild Føroya Lærarafelags endurspeglar okkara ynski um at vera við til at betra atgongdina hjá børnum til bøkur og harumframt at vera við til at stimbra lesigleðina. Umframt bókina, sum allir næmingar í 1. flokki fingu, hava vit síðani 2016 samstarvað við Bókadeild Føroya Lærarafelags um at rinda portogjaldið fyri limir í bókaklubbanum uttanlands.

Í 2025 vóru vit við til at senda 1.887 pakkar við føroyskum bókum til børn uttanlands, og hetta er ein vøkstur samanborið við árið frammanundan. Tá var tað 1.819. Gjøgnum hetta samstarvið fáa børn bøkur átta ferðir um árið, sum hjálpir teimum at varðveita tilknýtið til føroyska málið og mentanina. Limatalið veksur framvegis, og tí fáa enn fleiri familjur gleði av hesum átaki.

Millum annað vóru vit við til at framleiða eina lýsing um barnabókaklubban, sum varð víst í biografum og í sjónvarpi. Vónin er, at hetta fer at økja um limatalið. Í 2026 hava vit ætlanir um at styrkja samstarvið enn meira við nýggjum átøkum.

At stimbra lesigleðina hjá børnum og ungum hevur stóran týdning, og tí eru vit fegin um at vera ein partur av teimum góðu átøkum, sum BFL fremur.

**1.887**

Pakkar við føroyskum bókum



# Átøk

## Pengadagur

Ein onnur týðandi uppgáva hjá okkum er at upplýsa um góðar pengavanar. Í 2021 skipaðu vit fyri fyrstu Pengadøgunum, sum høvdu til endamáls at styrkja fíggjarligu vitanina hjá fólkaskúlanæmingum.
Á Pengadøgum vitjaðu kundaráðgevar og onnur starvsfólk í bankanum skúlar kring alt landið og undirvístu í:

- Inntøkum og útreiðslum
- Løn og skatti
- Lán og rentum
- Fíggjarætlan
- Trygd á netinum

Undirvísingin gav ungum amboð til at stýra egnum fíggjarviðurskiftum á skynsaman hátt og fyribyrgja møguligum avbjóðingum.

**Grønland og Føroyar**
Í 2022 víðkaðu vit Pengadagin til eisini at fevna um Grønland. Áhugin var sera stórur, og tey seinastu árini hava vit vitjað nógvar skúlar.
Tað var aftur væl eydnað í 2025, og í 2026 verður tað endurtikið.
Pengadagar stuðla undir okkara hugsjón um at veita fíggjarliga trygd – bæði yvirskipað og hjá tí einstaka - í Føroyum og í Grønlandi.

**Samstarv við Nám**
Í 2025 varð átakið víðkað til eitt samstarv, sum Nám – føroyski myndugleikin á undirvísingarøkinum – samskipar. Við at Nám veitir undirvísingartilfarið, og at allir peningastovnarnir í Føroyum eru við í samstarvinum, fáa enn fleiri næmingar upplýsing um fíggjarviðurskifti og góðar pengavanar. Vit gleða okkum til hetta samstarvið framyvir.



# Átøk

## Nútíðarlist

**Føroya Banka-savnið**
Eitt av høvuðsendamálunum hjá Føroya Banka-savninum er at stuðla samtíðarlist í Føroyum. Síðani savnið varð stovnað í 2017 hava føroysk listafólk fingið fíggjarligan stuðul til sítt arbeiði.

Í 2025 settu vit 200.000 krónur av til at bøta um (restaurera) list á okkara egnum deildum og 75.000 krónur til at stuðla virkseminum hjá grunninum. Harumframt keypti grunnurin fýra verk eftir Jens Dam Ziska við fígging, sum stóð eftir frá undanfarna ári. Eitt av hesum verkum er Floki, sum er víst á hesi síðu.

**Fleiri enn 600 listarverk**
Savnið eigur nú fleiri enn 600 listaverk, harav eru yvir 300 sýnd á almennum støðum. Hesar framsýningar geva fólki møguleika at uppliva føroyska list í gerandisdegnum.

Savnið skipar eisini fyri framsýningum og lænir listaverk út til søvn, almennar stovnar og privatar felagsskapir. Soleiðis verður tryggjað betri atgongd hjá føroyingum til føroyska list.

Við at stuðla savninum eru vit ikki bara við til at styrkja menningina av føroyski samtíðarlist, men eisini yvir fleiri ættarlið.

> **Fleiri enn 600 listaverk, harav yvir 300 eru sýnd á almennum støðum kring landið.**



# Highlights 2025

- Skeið í burðardygd til allar privatkundaráðgevar
- Double Materiality Assessment (DMA) kannað av granskoðara
- Handbóltssamband Føroya HSF stuðulsavtala
- Kvinnuhúsið avtala undirskrivað
- Orkukvøld kring Føroyar
- Vel Føroyar og Vel Grønland tiltøk í Danmark
- UArctic Congress 2026 stuðulsavtala
- Aktivering av stuðulsavtalum
- Áhaldandi fokus á átøk móti hvítvasking

# ESG 2025

Heimsmál

5

Net Promoter Score

65

Lægri starvsfólkaskifti

4,7%

Kvinnuligir leiðarar

49%

Beinleiðis útlát

burturbeint

vav 1

Óbeinleiðis útlát

minkað

vav 2

Orkunýtsla

minkað

nú lægri enn mál

Nýggj mál fyri

2030

sett

## Um frágreiðingina

Frágreiðingin er ein sjálvstøðug árlig Burðardygdarfrágreiðing (Corporate Sustainability Report, CSR) hjá Føroya Banka-samtakinum og inniheldur kunning um gongdina (Communication on Progress, COP). Frágreiðingin vísir tilgongdina hjá Føroya Banka til meginreglur hjá UN Global Compact og krøv í føroysku roknskaparlógini at yvirhalda ásetingar um mannarættindi, arbeiðarrættindini, umhvørvið og anti-mutur.

Frágreiðingin er galdandi fyri virksemið hjá Føroya Banka-samtakinum í fíggjarárinum 2025 og inniheldur dátur um bankavirksemi, tryggingarvirksemi, meklaravirksemi og pensjón undir hesum fyritøkum: Føroya Banki, Bankivik, Trygd og Skyn. Frágreiðingin nágreinar gongdina og málini, sum viðvíkja burðardygd hjá samtakinum, og veitir upplýsingar um ta ávirkan, sum virksemið hjá Føroya Banka hevur á fólk og umhvørvið. Frágreiðingin inniheldur eisini ESG-lyklatøl, lýsing av menning, mál og viðkomandi átøk.

Frágreiðingin er ment í tráð við burðardygdarpolitikkin hjá Føroya Banka-samtakinum.

Frágreiðingin heldur føroyska og danska lóggávu.

P/F Føroya Banki
Oknarvegur 5
P.O Box 3048
FO-110 Tórshavn
Tel. +298 330 330

